## Jólapostur 2008

### Jólapostur til grannalondini eigur at vera á posthúsinum í **Tórshavn** í seinasta lagi:

| | Flogpostur | | Skipspostur | |
|---|---|---|---|---|
| | Brøv | Pakkar | Brøv | Pakkar |
| Bretland | 18. des. | 10. des. | 04. des. | 04. des. |
| Danmark | 19. des. | 17. des. | 11. des. | 11. des. |
| Finnland | 16. des. | 12. des. | 04. des. | 04. des. |
| Grønland, Nuuk | 16. des. | 12. des. | 13. nov. | 13. nov. |
| Ísland | 18. des. | 18. des. | senda ikki við skipi | |
| Noreg | 12. des. | 11. des. | 04. des. | 04. des. |
| Svøríki | 18. des. | 15. des. | 04. des. | 04. des. |

Omanfyri nevndu freistir eru at síggja á **www.post.fo**.
Upplýsingar um seinastu freistir at senda jólapost til onnur lond og neyvari freistir um jólapost til býir og bygdir í Grønlandi eru at fáa á størstu posthúsunum.

**Innlendis**
Jólapostur til móttakarar í Føroyum eigur at vera latin inn í seinasta lagi:
**Fríggjadagin 19. desembur**

**Tollgreiðsla**
Tað er sera umráðandi fyri skjóta tollgreiðslu í móttakaralondunum, at vøruinnihaldið (gávurnar) í sendingum verður skrivliga útgreinað á tollsøgn.

**Matvøra**
Avmarkingar eru, tá matvøra skal sendast til útheimin. Upplýsingar eru at fáa á posthúsinum, um hvat og hvussu nógv kann sendast í hvørjari sending.

Veðrið kann darva postflutningin. Sendið tí postin í góðari tíð.

**Postverk Føroya ynskir øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.**

post.fo



## Fiskivinnuskúlin í Vestmanna

### Húsavørður til Fiskivinnuskúlan

Treytað av játtan á løgtingsfíggjarlógini søkir Fiskivinnuskúlin eftir húsavørði at byrja á nýggja skúlanum tann 2. januar 2009.

**Arbeiðsuppgávur**
- alt vanligt húsavarðararbeiði
- at hava umsjón við og røkja bygningin hjá skúlanum
- at hava ábyrgd av økinum uttanum skúlan
- at syrgja fyri, at hita-, vatn-, ventilatión- og elskipanin riggar
- at rigga til í sambandi við tiltøk og vera til handa kring virksemi skúlans

**Vit vænta, at tú**
- hevur handverkara- ella líknandi útbúgving
- hevur telduførleika á brúkarastigi
- hevur evni at skipa fyri og góð samstarvsevni
- trívist við at vera saman við ungdómi
- hevur royndir frá líknandi starvi (tó ongin treyt)

**Vit bjóða**
- eitt fjølbroytt og spennandi starv
- eitt vælvirkandi og øðrvísi skúlaumhvørvi
- eitt arbeiðspláss í støðugari menning
- ein positivan leiðsluhugburð til næmingar og starvsfólk

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum, váttanum og/ella viðmælum fyri arbeiðsroyndir skulu stílast og sendast til Fiskivinnuskúlan, Niðarivegur 71, Postrúm 96, 350 Vestmanna. Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 28. november 2008, kl. 12.**

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup Andreasen, skúlastjóra, á tlf. 424 573 ella 221 654.

**FISKIVINNUSKÚLIN**
Postrúm 96 · 350 Vestmanna · Tlf. 424 573 · fiskvest@fiskvest.fo

*Á Fiskivinnuskúlanum ganga umleið 50 næmingar á støðisárinum innan fiskivinnu (SIF) og hægri útbúgving innan fiskivinnu (HIF). Á skúlanum eru trý følk í føstum starvi, meðan hinir undirvísararnir eru settir sum tímalærarar. Skúlin skipar fyri lærlingaútbúgvingum innan fiskavirking, aling, fiskireiðskap og landbúnað og skipar eisini fyri skeiðum t.d. innan innaneftirlit og matvørutrygd.*

VASTI 459010

## STARVSLÝSING




Endurlýsing

### Deildarleiðari, avloysari í 2 ár

Mikrobiologiska deild á Heilsufrøðiligu starvsstovuni leitar eftir deildarleiðara, sum avloysara til starv í 2 ár.

Sí www.hfs.fo ella www.portal.fo.

Freistin at lata umsókn inn er mikudagin 19. nov. 2008 kl. 12.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 556 400
Fax +298 556 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

VASTI 459010

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Lesið Sosialin -tað loysir seg

## Mekanikari søkist

**Mekanikari søkist til Pitstop í Hornabø at byrja beinanvegin.**

**Sveinabræv og koyrikort er krav.**

**Møguligt er at arbeiða flekstíð.**

**Góð løn til rætta umsøkjaran.**

**Áhugaði kunnu ringja á tlf. 590009**

PITSTOP dekkar alt
Tlf. 520522